# Nýggj andlit - nýtt tíðarskeið

**VINNUFRAMI**

Tíðindaskriv

Menningarstovan fór í søguna, tá stovnurin legði saman við Ferðaráði Føroya í ár. Men endamálið við stovninum – at menna og fremja bestu umstøður fyri føroyskt vinnulív – livir enn í øllum góðum í nýggja vinnuframastovninum, sum júst hevur fingið nýtt navn.

Tá henda grein er komin á prent, hevur Menningarstovan – saman við Ferðaráði Føroya – fingið nýtt navn, almannakunngjørt á móttøku á farnu Menningarstovuni tann 2. mai.

»Menningarstovan er tó ikki farin í søguna meir enn so, at allar tær tænastur, sum stovnurin higartil hevur veitt vinnuni, verða tær somu og væntandi enn betri í nýggjum og størri stovni«, sigur Elin Heinesen, stjóri.

Víðari sigur hon, at stovnurin aftur í ár fer at luttaka á North Atlantic Fish Fair, tí hetta er eitt frálíkt høvi at hitta føroysku vinnuna og at røkja útlendsk sambond.

### Nýggjur verkætlanarleiðari

Unn Poulsen er nýsettur verkætlanarleiðari á millumlandadeildini og hevur ábyrgdina av básluttøkuni á NAFF. Unn er útbúgvin cand.ling.merc. í enskum máli og hevur altjóða royndir m.a. við patentvirksemi og ráðgeving.

Unn sigur, at stovnurin við síni luttøku á NAFF ynskir at vísa á sítt fjølbroytta tænastuvirksemi til føroysku vinnuna. Serliga verður dentur lagdur á fylgjandi tænastur: Vinnuferðir, framsýningarluttøka uttanlands, kunningar- og ráðgevingartænasta og føroyska "Export Directory", har allar føroyskar útflutningsfyritøkur kunnu gerast sjónligar.

### Vinnuferðir

Fleiri føroyskar útflutningsfyritøkur hava luttikið á ymsum vinnuferðum saman við Menningarstovuni seinastu árini. Leiðin hevur gingið til m.a. Spania, Russlands og Estlands. Løgmaður stóð á odda fyri seinastu handilsferðini, sum var til Íslands fyrr í ár. 20 føroyskar fyritøkur vóru við, og var hetta ein handilsferð, har fyritøkurnar fingu bjóðað ein samlaðan pakka við felags vinnufundum, B2B fundum, ráðstevnu og móttøku.



*Elin Heinesen, stjóri á nýggja stovninum, gleðir seg til at hitta føroysku vinnuna á NAFF.*

Elin Heinesen sigur, at av tí at stovnurin hevur eitt stórt millumlandanetverk við líknandi stovnar í øðrum londum, so er gjørligt at standa fyri sera málrættaðum vinnuferðum, har tørvurin hjá einstøku fyritøkuni verður nøktaður.

### Offshore Europe - Deadline!

Menningarstovan hevur verið upprunin til felags føroyska framsýningarluttøku á mongum altjóða framsýningum. Nú er tað nýggi stovnurin, ið stendur fyri yvirskipaðu ábyrgdini av eini røð av framsýningum.

Nevnast kunnu European Seafood Exposition, heimsins størsta fiskavøruframsýning, sum er í Brússel á hvørjum ári. Icelandic Fisheries Exhibition og oljuframsýningunum Offshore Europe og ONS - Offshore Northern Seas, sum annaðhvørt ár eru í Aberdeen og í Stavanger.

"Ein væleydnað ESE-luttøka er júst farin afturum, og vit eru farin undir fyrireikingararbeiði til Offshore Europe, ið verður í Aberdeen í døgunum 4. – 7. september. Seinasta freist at melda seg til føroyska landabásin í Aberdeen er 15. mai. Og tað ber til at fáa tilmeldingina avgreidda á NAFF við at venda sær til okkum á bási nr. A-115" greiðir Unn Poulsen frá.

### Hentir upplýsingar á www.trade.fo

Saman við altjóða netverki uttanlands og einum vælútbygdum úrvali av dátugrunnum fáa útflutningsfyritøkur eina røð av upplýsingum um marknaðir, fyritøkur uttanlands, tollupplýsingar og aðrar útflutningstekniskar spurningar.

Ein ørgrynna av upplýsingum liggur á heimasíðuni *www.trade.fo* undir Útflutningshondbók, og fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til stovnin antin við at ringja, senda teldupost ella við at støkka inn á gólvið. Av dátugrunnum kunnu nevnast útflutningshondbøkur hjá grannalondum okkara, Kompass, Euromonitor, landaupplýsingar frá danska útflutningsráðnum og World Tariff.

### Export Directory

Á ensku útgávuni á heimasíðuni www.trade.fo er ein knøttur, sum eitur Export Directory. Her eru útflutningsfyritøkur vælkomnar – móti einum lítlum gjaldi - at skráseta seg við upplýsingum um fyritøkuna, og hvørjar vørur og tænastur fyritøkan selir.

Unn Poulsen sigur, at hon, saman við einum starvsfólkatoymi á nýggja stovninum, gleðir seg til at hitta føroysku vinnuna á bási nr. A-115 til eitt gott prát um framtíðarsamstarv. Eisini vil hon sera fegin hoyra um hugskot frá vinnuni til áhugaverdar verkætlanir, nú stovnurin er vorðin størri, og harvið møguleikarnir eru betri til enn størri og fjølbroyttari virksemi.

SKIPASMIÐJAN



Vælkomin á North Atlantic fish Fair 2007
Høll A # Stand 172

pétur & pétur 320 870

HEMPEL
NORDHAVN
FJM RUNAVÍK
WÄRTSILÄ
Rolls-Royce
YORK

Sosialurin